Fótbóltur, fótbóltur, fótbóltur...

Sjálvt um ve›ri› er av tí fægrasta í dag, so eru ta› tó mong sum velja at halda seg innandura. Sofurnar kring landi›, eru tætt fólka›ar í hesum døgum. Holland, er saman vi› Belgien, vertur fyri EM endaspælinum í fótbólti. Tey sum ikki tíma at hyggja eftir fótbólti, hava ikki gó›ar dagar. Næstan frá morgni til myrkus er sjónvarpi› um at spreingjast av fótbólti, allir dystirnir ver›a vístir, so ta› krevur sín mann, um tú skalt síggja alt.

Á flestu skúlum og arbei›splássum gongur práti› av tí sama mest um fótbólt. Hví mátti ta› nú ganga so illa hjá Onglandi? ella er portugisiksi Figo besti spælarin í kappingini? ella er ta› tann norska verjan sum er tann sterkasta? Spurningarnir eru nógvir, og svarini eru enn fleiri. Tá ta› kemur til fótbólt hava næstan øll eina meining.

Hjá teimum sum slett ongan áhuga hava fyri fótbólti, er líti› at ivast í, at hetta eru rættuliga troyttandi dagar. Fólk sum ikki hava áhuga í fótbólt, duga heldur ikki at skilja tey sum hava áhuga.

Alt ver›ur ávirka› av EM endaspælinum, ikki eingong Dagur & Vika ver›ur send til rætta tí›. Yngd er fyri ein part eisini ávirka› av øllum fótbóltininum, og fótbóltsprátinum. Vit hava tosa› vi› ein fótbóltsáhuga›an, sum fyrsta dagin fer til Hollands at vera hjástaddur til nakrar av seinastu dystunum í kappingini.

Umframt at hetta er ein fótbóltstí›, so er hetta eisini feriutí›. Flestu skúlar eru um at vera lidnir, og á arbei›splássum kring landi› eru fólk so smátt vi› at seta hol á summarfrítí›ina hjá sær.

Nógv eru tey sum leita sær út um landoddarnar, og ta› er eisini rættuliga skilligt. Pástandurin um at føroyska ve›urlagi› ikki er fyri fólk, ver›ur ofta havdur á lofti, og eisini n‡ttur sum umbering fyri at tiltuska sær nakrar dagar á onkrari útlendskari sólstrond.

Yngd hevur hugt eitt sindur nærri eftir hvar og hvussu fólk fer›ast, og kanska eru eisini onkur rá›ini at heinta, um tú ert í iva.

Eftir er bara ynskja øllum gó›an mikudag, og ta› er hervi› gjørt.

Send inn og vinn

3arin

letur eina fløgu um vikuna til teg, sum hevur besta innslagi› í Yngd.

Vinn eina fløgu

Nú gevur Yngd tær eisini møguleikan at vinna onkra av nýggjastu fløgunum, sum eru á marknaðinum. Fyri at lesararnir eisini skulu hava høvi at koma fram at, hava vit sjálvsagt rúm fyri einum brævkassa, har lesararnir fáa høvi til at siga sína hugsan um líkt og ólíkt.

Hevur tú eina yrking, eitt hjartasuff um okkurt, ella ein spurning til Yngd ella okkurt heilt annað, so er bara at finna pennin ella telduna fram, og skriva til okkum. Antin til Sosialurin postboks 76, 110 Tórshavn, merk brævbjálvan „Yngd". Ella send okkum teldupost á yngd@sosialurin.fo

Hvørja viku verður so drigið lut ímillum innkomnu brøvini, og vinnarin fær eina spildurnýggja fløgu sendandi frá 3'aranum í SMS. Fyri at eingin skal smæðast burtur, seta vit onga treyt um at innkomið tilfar verður undirskrivað við fullum navni. Navn og bústaður eiga tó verða upplýst til Yngd, soleiðis at vit vita, hvar ein møgulig fløga skal sendast.

Tí›indabla›i› Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn
Tlf: 311820
Fax: 314720
Teldupostur:
yngd@sosialurin.fo

Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller

Bla›stjórn:
Fró›i Løkságar›

Uppseting:
Karis Olsen

Yngd er ein partur av Sosialinum mikudag. Evstamark er á middegi fríggjadag

Saman vi› hvørjum bólki vann Malan Ey›unsdóttir Prix Føroyar í 1997?

Svari› var:
Mark No Limits

Vinnarar av kappingini vóru:

Frank Poulsen, Fuglafjør›ur
Annika Jacobsen, Tórshavn
Mása Tróndheim, Klaksvík
Alis Jacobsen, Skálabotnur
He›in Klakkstein, Klaksvík
Elisabeth Rubeksen, Tórshavn
Robert á Lakjuni, Saltangará
Bár›ur Árstein, Tórshavn
Rakul og Jóna, Tórshavn
Maria Reynstind, Mi›vágur

Pílagrímsfer› til Hollands

Tann dagin Sámal fær H.H. prógvi› handa›, setur hann seg eisini í flúgvaran vesturi Vágum. Túrurin gongur til Hollands, har EM fótbóltur er á skránni

Fró‹i Løkságar‹

Føroyingar bera or› fyri at vera svakliga áhuga›ir í fótbólti, hetta sást best hvørt vikuskifti í summarhálvuni, tá li›ini í fyrstu deild dystast. Tá fer ma›ur av húsi til fótbóltsdyst, og ikki er óvanligt at fylgt ver›ur vi› yndisfelagnum til útidystirnar eisini.

Fyri tey meinast raktu, er føroyskur fótbóltur ikki nokk. Umframt at fara til landskappingardystirnar og landsdystirir her heima, og enntá eisini onkran av dystunum føroyska landsli›i› spælir uttanlands, so hendur ta› seg at nøkur av hesum fólkunum, eisini fara út at fer›ast, fyri at síggja okkurt av teimum stóru Evropeisku li›unum leika.

Í Hesum døgum eru Holland og Belgia vertir fyri endapælinum í EM kappinini í fótbólti. Sekstan lond hava tryggja› sær atgongd til endaspæli›, sum í løtini er uppá ta› hægsta. Næstu vikurnar hava tey fótbóltsáhuga›u nógva at gle›a seg til.

Ein av fótbóltsgla›u føroyingunum er Sámal Mikkelsen. Hann gongur í løtuni til endaliga próvtøku á handilsskúlanum á Kambsdali, har hann um nakrar dagar fær H.H. prógvi› handa›.

Sámal hevur í nógv ár havt sera stóran áhuga fyri fótbólti, og umframt at hava fylgt væl vi› í tí heimligu kappingini, so hevur hann eisini havt eitt vaki› eyga vi› ensku Premier League, har serliga Manchester United hevur hansara áhuga.

Sámal fer so skjótt próvtøkan er fingin frá hondum til Hollands at hyggja eftir fótbólti. Hetta er ikki fyrsti túrurin hjá Sámal uttanlands at hyggja eftir fótbólti.

-Eg var saman vi› nøkrum vinmonnum til heimsmeistarkappingina í Fraklandi í 1998, og ta› var eitt ótrúligt upplivilsi. Tá var meiningin at eg og Stefan (vinma›ur hjá Sámal, sum skal vi› til Hollands - bla›m.) skuldu fara, men ta› bleiv av ongum, og í sta›in blivu ta› a›rir, sum eg fór í fer›alag vi›.

- Nú, tá EM stó› fyri durum, tosa›u vit saman aftur, og avgjørdu at venda okkum til F.S.F. fyri at vita um teir høvdu nøkur atgongumerkji at selja okkum. Vit vera bá›ir lidnir vi› skúlan nú, so vit hildu ta› vera ein passandi enda á skúlaárinum.

F.S.F. hev›i tey ney›ugu atgongumerkini, og fríggjadagin tann 23. Juni seta Sámal og Stefan seg í flúgvaran, sum skal føra teir ni›ur til Danmarkar, á›renn flogi› ver›ur ví›ari til Holland, har b‡irnir, Rotterdam og Amsterdam, ver›a karmur um teir tríggjar dystirnar teir hava ogna› sær atgongumerki til. Talan er um eina fjór›ingsfinalu, a›ra semifinaluna og sjálva finaluna.

-Vit høvdu teir somu dystirnar tá vit vóru í Fraklandi, so eg havi avgjørt hug at royna ta› umaftur. Ta› er eitt heilt serligt upplivilsi at vera til ein slíkan dyst. Stemningurin á stadion er ótrúligur, og má fyri einn hvønn prís upplivast.

Sámal hevur ein serligan tokka til enskan fótbólt, og vónar hann tískil at síggja Ongland í finaluni, men eftir at hava sæ› dystin millum Ongland og Portugal, ljó›ar hann eitt sindur ivandi um hetta ver›ur til naka›.

-Dreymafinalan hev›i veri› millum Ongland og Holland, sum mær eisini dámar at hyggja eftir. Stóri áhugin fyri Onglandi kemur nokk av at eg alla mína tí›, havi sæ› enskan fótbólt í sjónvarpinum. Skal eg vera erligur so má eg vi›ganga at Ongland í hesi kappingini ikki spælir tann besta fótbóltin. Tak bara dystin móti Portugal, har spældu portugisararnir nógv betur. Ta› er bara okkurt serligt vi› Onglandi sum eg ikki dugi at forklára.

Sámal setur stórar vónir til henda túrin. Hesar vónir byggir hann á gó›u royndirnar av túrinum hann og vinmennirnir høvdu til Fraklands í 1998.

-Á einum tílíkum túri møtir tú einari rúgvu av spennandi fólkum, sum øll hava ein brennandi áhuga fyri fótbólti, umframt at tú eisini sært nakrar ógloymandi dystir, sigur Sámal ví›ari.

Ta› bleiv eisini til onkra skemtiliga hending á túrinum til HM . Sámal grei›ir frá at tá teir vóru í Fraklandi til finaluna í 1998, høvdu teir keypt sær franskar troyggir, og høvdu mála› seg sum hini fronsku vi›ahaldsfólkini. Uttan fyri ítrottarvøllin var ein hópur av tí›indafólkum, úr øllum heiminum, sum gjørdu samrø›ur vi› vi›haldsfólk.

-Ein journalistur frá einari japanskari sjónvarpsstø› kom yvir til okkara og spurgdi um onkur av okkum ikki dugdi eitt sindur av enskum. Vit hildu at vit kundu gera eina roynd, og tískil enda›u vit í japonskum sjónvarpi, ílætnir sum franskmenn. Eg haldi ikki at journalisturin nakrantí› fanga›i, at vit vóru rættuliga langt frá at vera franskmenn.

Stendur ta› til Sámal sjálvan, so ver›ur hetta ikki seinasta pílagarímsfer›in hjá honum, sum hann nevnir hesar fótbóltsfer›irnar.

-Dreymurin er eisini ein dag at kunna seta seg á Old Trafford at hyggja eftir Manchester United, men ta› liggur longur frammi í tí›ini, sigur Sámal at enda.

Yngd ynskir Sámal og Stefan og annars øllum føroyingum sum leita sær til Hollands at hyggja eftir fótbólti, eina gó›a fer›.